# Skulu hava felags støði at standa á

**Næsta summar verða øll lond í Evropa, sum hava fiskivinnu í Evropa, við á ráðstevnu í Havn**

RÁÐSTEVNA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Nú skulu øll lond í Evropa, sum hava fiskivinnu, hava felags støði at standa á

Tað er eitt endamál við eini ráðstevnu, sum verður í Havn næsta summar.

Tað er Óli Samró, sum er vertur fyri hesi ráðstevnuni, ið verður hildin beint fyri ráðstevnuni um samsvarið ímillum teori og veruleika í fiskivinnuni, sum vit greiða frá í hinari greinini her á síðuni.

Sostatt verða ikki færri enn 21 lond við á ráðstevnuni, sum er í døgunum frá 1. til 3. juni. Og so tekur ráðstevnan um teori og veruleika við 4. juni og tá verða umboðini fyri hesi 21 londini eisini umboðað.

Óli Samró sigur, at á hesi ráðstevnuni fer ein arbeiðsbólkur við umboðum úr 21 fiskivinnutjóðum í Evropa at finna eitt felags støði at standa á, so at tað í framtíðini skal bera til at sam-anbera fiskivinnuna í teimum ymsu londunum.

– Eitt nú verður arbeitt við at gera felags búskaparlig lyklatøl og onnur lyklatøl, eitt nú fyri motorstøddir, tonsatal o.s.fr., fyri øll hesi londini so at tað ber til at samanbera úrslitið hjá fiskivinnuni í ymsum londum og tað verður hetta, sum arbeiðsbólkurin fer at viðgera á ráðstevnu í Havn næsta summar, sigur Óli Samró.

# Vilja vísa hvussu sambandið er ímillum teori og veruleika



*– Endamálið er ikki at verja eina skipan framum eina aðra. Endamálið er at skjalprógva, hvussu veruligi fiskiskapurin og fíggjarliga úrslitið hjá fiskiflotanum hevur verið í nógvum londum og at samanbera tølini við tær teoriir, sum serfrøðingar hava sett fram, sigur Óli Samró*

**Í summar verður ein stór ráðstevna í Føroyum, har altjóða serfrøðingar fara at viðgera spurningin um, hvussu teori hjá serfrøðingum samsvarar við veruleikan í fiskivinnuni**

ALTJÓÐA RÁÐSTEVNA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Hvussu er samsvarið ímillum teori og veruleikan í fiskivinnuni.

Tað er ein spurningur, sum eitt úrval av altjóða serfrøðingurin fer at royna at svara á eini ráðstevnu, sum verður í Havn í summar.

Vit hoyra aftur og aftur, at tað tey, sum arbeiða í fiskivinnuni eru í stórari andsøgn til teir serfrøðingar, sum skulu mæla okkara myndugleikum til, hvussu nógv tað er ráðiligt at fiska.

Og á ráðstevnuni er júst ætlanin at skjalprógva, hvussu sambandið er ímillum teori og veruleika.

Í hesum sambandi hevur Óli Samró tikið stig til at savna eitt úrval av serfrøðingum á eini ráðstevnu í Havn í summar at viðgera hesi viðurskifti.

Ráðstevnan verður í Útvarpshøllini fríggjadagin 4. juni og tað verður Fiskimálaráðið og Óli Samró, sum eru vertir fyri ráðstevnuna og tað verður Jacob Vestergaard, landsstýrismaður í fiskivinnumálum, sum fer at seta hana.

Orðstýrari verður Árni Olafsson.

Tey, sum vera við á ráðstevnuni, verða eitt úrval av altjóða serfrøðingum í fiskivinnuni, bæði fiskifrøðingar, granskarar og eisini fiskimenn.

Tað er ikki heilt greitt, hvørjir allir luttakararnir verða, men nakrir av teimum eru:

Røgnvaldur Hannesson, professari úr Noregi, Jesper Raakjaer Nielsen, professari úr Danmark, Pavel Salz, "Project manager European Assessment on Fisheries" úr Niðurlondum, Hjalti í Jákupsstovu, stjóri á Fiskirannsóknarstovuni, Menakhem Ben-Yami, fiskimaður og "international fisheries development and management adviser" úr Ísrael. Guðbrandur Sigurðsson, stjóri í Brim í Íslandi, Torben Foss í "PriceWaterhouse Coopers" í Noregi og Óli Samró í FAREC, sum allir fara at leggja fram.

Men tað verða vera eisini fleiri aðrir serfrøðingar við á ráðstevnuni, sum vendir sær til fiskivinnuna, íleggjarar, fíggingarstovnar, politikarar, myndugleikar, ráðgevarar og granskarar úr øllum heiminum.

## Samanbera teori og veruleika

Óli Samró sigur, at saman við fleiri altjóða búskaparfrøðingum, hevur hann nú í eina tíð arbeitt við at savna saman hagtøl úr nógvum ymsum londum um fiskiskap og fiskivinnu síðani 1996, til dagin í dag.

Tað er úrslitið av hesum kanningum, sum verður lagt fram á ráðstevnuni næsta summar.

– Fiskiskapurin og fíggjarliga úrslitið hjá fiskiflotanum skal so samanberast við tær teoriir, sum fiskifrøðingarnir hava sett fram.

– Endamálið við verkætlanini er at skjalprógva við turrum tølum, hvussu fíggjarliga úrslitið hjá fiskiflotanum er undir ymsum fiskivinnuskipanum og sostatt eisini, hvussu tær ymsu skipanirnar roynast í verki afturímóti teimum teorium, sum serfrøðingar hava um fiskiskap og fiskivinnubúskap.

Hann sigur, at øðrumegin hava vit fiskifrøðingar og fiskivinnufrøðingar, sum hava nakrar teoriir um, hvussu samanhangurin er í fiskivinnuni og, hvussu samanhangurin er ímillum metingar um fiskastovnar og búskapin í fiskivinnuni.

– Hinumegin hava vit so hagtølini fyri, hvussu fiskiskapurin er og hvussu fíggjarliga úrslitið hjá fiskiflotanum er.

– Vit fara at vísa, hvat tær teoretisku metingarnar hava sagt hesi seinastu árini, men so leggja vit eisini tøl á borðið fyri, hvussu fiskiskapurin og fíggjarliga úrslitið hjá fiskiflotanum í veruleikanum hevur verið í sama tíðarskeiði.

– Vísir tað seg so, at frávik eru, er ætlanin at útgreina, hví hesi frávik eru og, hví samsvar ikki er ímillum teori og veruleika.

## Tøl úr nógvum londum

Hesi seinastu árini hevur Óli Samróð gjørt nógv burturúr at samanbera fíggjarliga úrslitið hjá ymsum skipabólkum í fiskiflotanum í Íslandi, Noregi og í Føroyum.

Hetta er fyrstu ferð, at slíkar kanningar eru gjørdar og hetta verður ein partur av grundarlagnum undir ráðstevnuni, sum verður í summar.

– Við hesum kanningum, hava vit, fyri fyrstu ferð, fingu eina greiða og álítandi mynd av, hvussu ymsar skipanir, sum skulu stýra fiskiskapinum, virka í veruleikanum.

Men í sambandi við ráðstevnuna, er tað eisini ætlanin at fáa tøl fyri heilt onnur lond eisini, eitt nú Skotland, Ný Sæland og Niðurlond fyri at nevna nøkur dømi.

– Á pappírunum eigur føroyska fiskidagaskipanin ikki at virka, tí eftir henni hava skipini avmarkað dagatal at fiska í og tí fiska tey bara, tá ið tíðin er tann besta, tá ið fiskurin er feitastur og prísurin er best.

– Sostatt verður bara rómin skúmaður omanav.

– Í teoriini eiga kvotuskipanir at virka betri, tí tá verður skipið alla tíðina útnyttað so væl sum gjørligt. Skipini vita alla tíðina, hvussu nógv, tey hava loyvi at fiska og tí leggja tey alla tíðina fiskiskapin til rættis, so at skipið verður rikið so effektivt, sum gjørligt.

Óli Samró leggur tó dent á, at hetta er ikki ein ráðstevna, sum hevur til endamáls at verja eina skipan framum aðra.

– Hetta er ikki ein ráðstevna, sum hevur til endamáls at verja okkara egnu fiskidagaskipan, framum aðrar skipanir. Hetta er ein ráðstevna, sum skal viðgera hesi viðurskifti púra óheft, á einum høgum, fakligum. Endamálið er at skjalprógva tað veruliga úrslitið av fiskidagaskipanini og tað veruliga úrslitið av ymsum kvotuskipanum og at seta tað upp ímóti teimum teorium, sum serfrøðingar hava um fiskiskap og fiskivinnubúskap, sigur Óli Samró.





FAROE Law provides a wide range of legal assistance to business enterprises with an emphasis on the commercial objectives of the client.
Our areas of practice include:

- Banking an financing law
- Corporate and Company law
- Construction law
- Employment law
- International contracts
- IPO
- Litigation and arbitration
- Mergers acquisitions
- Oil and Gas law
- Projects and project development
- Property transactions
- Shipbuilding and financing
- Tax law
- Turnkey

FAROE Law as a branch of DANIA Law Firm is part of an organisation that employs a staff of 70 persons, 24 of whom are lawyers, who practice in the Faroe Islands, Denmark, Sweden, Russia, the Baltic States and Greenland

FAROE
LAW

Tróndargøta 19 · P.O.Box 1218 · FO-110 Tórshavn · Tel +298 359900 · Fax +298 359901
faroe-law@faroe-law.fo · www.faroe-law.fo

*Copenhagen*
Bredgade 49
Postbox 9007
1260 København K
Tel +45 33 17 99 00
Fax +45 33 17 99 01
info@dania-law.dk

*Svendborg*
Det Gule Pakhus
Havnepladsen 3
5700 Svendborg
Tel +45 62 21 20 10
Fax +45 62 21 75 50
info@dania-law.dk

*Russia*
Dania Law Int. ApS
M. Dmitrovka 8-2
103006 Moskva
Tel +7 095 299 43 05
Fax +7 095 299 02 66
avista@df.ru

*Greenland*
Nuna Advokater
P.O. Box 59
3900 Nuuk/Godthåb
Tel +299 32 13 70
Fax +299 32 41 17
email@nuna-law.gl

aquatherm



Umhvørvisvinarlig plastrør at sveisa.
Skjótt og lætt at arbeiða við.
Sera vælegnað til vatnleiðing, sanitet, hitaverk, trýstluft o.m.a.

Umboð í Føroyum er:

demich

Stiðjagøta 2 • Tórshavn • Tel 311071 • Fax 310460

Sí eisini www.demich.fo

Jólaborðhald á Eiði

Fram til jóla bjóða vit viðskiftafólki okkara at hava jólaborðhaldið hjá okkum.

Eisini ber til at fáa mat koyrdan út.

Vel eitt nú millum hesar rættir:



Marinerað sild
Karry sild
Roastbeef v/piparrót
Egg & rækjur
Fiskasalat
Rullupylsa
Fleskasteik
Sylta
Flógv fiskafløk
Flógvar frikadellir
Flógvir búffar v/ steiktum eggi

kr. 175,- pr. persón

Við rís à la mande

kr. 210,- pr. persón



Hotel Lonin á Eiði

Tel 423456 ella 269135



**Mekaniskur verkstaður**

Umvæling og umbygging av skipum og bátum.
Umvæling og útskifting av motorum, gearum, og øllum mekaniskum lutum.
Alt vanligt smiðju og plátuarbeiði úr stáli og aluminium.
Seramboð til slíping av ventilum og ventilsetrum.
Umvæling og reinsing av turboløðarum.

**Skips-og bátamotorar**

Umboð: Mitsubishi, Grenaa, M.A.N., Bergen Diesel, Bukh, Yanmar

**Generatoranlegg**

Mitsubishi 20 - 1600 Kw.

M.A.N. 80 - 596 Kw.

**CJC Filtur**

Einaumboð uppá CJC filtur í Føroyum.

Kunnu nýtast til dieselolju, smyrjiolju, gearolju, hydraulikkolju og transformatorolju.

**Mobilkranar**

Tveir mobilkranar.

Kunnu lyfta upp til ávikavist 45 og 80 tons.

MEKANIK
p/f OLIVAR RASMUSSEN
Fjøruvegur Postboks 72 FO-620 Runavík
Tlf.: +298 447425 Fax.:+298 448021 E-mail: mekanik@post.olivant.fo